


# Tøkk



Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi,
tá okkara høgt elskaðu dreingir

**Niklas Róason og Teitur Róason**

andaðust og vórðu jarðaðir

.

Tøkk til øll, sum hjálptu til, vóru og eru um okkum
í hesi sváru tíð.

Gleðilig jól og gott nýggjár

**Rói & Kristina**



# Starvsfólk til Støðina

Søkt verður eftir starvsfólki til støðina hjá Atlantic Airways á flogvøllinum

**Arbeiðið fevnir um:**
Støðin hevur til uppgávu at veita neyðugu tænastuna frá tí at kundarnir koma í terminalin til teir fara avstað – og hetta á ein hátt, har kundin kennir seg vera í góðum og professionellum hondum, bæði tá talan er um avgreiðslu við diskin, kekk-in og telefon.

Tú skal saman við liðnum á Støðini vera við til at tryggja hetta, og loysa tær uppgávur, ið hoyra Støðini til.

**Førleikar:**
Vit leita tí eftir einum fólki, ið hevur góð samstarvs-evni, er ágrýtin og eisini kann arbeiða sjálvstøðugt. Tú skal vera fyrikomandi og duga væl við fólki. Førleikin at samskifta á enskum og skandinaviskum skulu eisini vera í lagi, umframt at tú dugur væl at nýta telduna í tínum dagliga arbeiði.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til bókingarskipanir og ferðaseðlasølu

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og mennandi arbeiðsumhvørvi saman við góðum starvsfeløgum í einum til tíðir kravmiklum og rokmiklum umhvørvi. Arbeitt verður skiftandi arbeiðstíðir.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 02. januar 2007. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Jónleyg Joensen á tlf. 34 10 50 ella e-mail: jonleyg@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, Vága floghavn, 380 Sørvágur, Att.: Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðari ella við telduposti til: steinbjorn@atlantic.fo.

www.sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 180 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 378 milliónir krónur í 2005. Atlantic Airways hevur seks flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasam-band til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo

**Hita-, vatn-, sanitet- og ventilatiónsarbeiði verður gjørt**




telefon 230 500 & 230 501



**Vit takka fyri gott samstarv í skjótt farna ári við ynski um eini gleðilig jól og eitt eydnuríkt nýggjár**

**Bilverkstaðurin á Kambsdali**
www.bvk.fo
Tlf 444495 ella 284495

Lesið Sosialin - so eru tit við